## Kunning um MiniTeenStreet 2020 - Til samkomur, kirkjur og einstaklingar



### MiniTeenStreet 2020

Í vikuskiftinum 21. til 23. februar 2020 koma hjúnini Josh og Debs Walker til Føroya á fjórða sinni at luttaka á MiniTeenStreet í Bylgjuni í Runavík. Í ár verður tosað og lært út frá lívinum hjá Mósesi og evnið er "EITT". Tað er TeenStreet Føroyar, sum skipar fyri.

### Felagskristilig stevna

MiniTeenStreet er ein felagskristilig stevna, har samkomur og kirkjur í felag geva okkara ungdómi ein pall, har tey í góðum andaligum felagsskapi verða uppbygd og styrkt í trúnni. Tiltakið er tó ikki einans ætlað ungdómum, men øllum, sum hava hug og ynskja at vera við.

### Skráin fyri MiniTeenStreet 2020

| **Fríggjakvøld:** | **Leygardag:** | **Sunnukvøld:** |
|---|---|---|
| Kl. 20.00: Møti við Josh og Debs Walker<br>Kl. 22.00: ThroneRoom | Kl. 20.00: Møti við Josh og Debs Walker<br>Kl. 22.00: ThroneRoom | Kl. 18.00: Møti og ThroneRoom við Josh og Debs Walker |

### Seminar leygardag kl. 16 í skúlanum við Løkin

Leygardagin kl. 16:00-18:00 verður møguligt hjá øllum at luttaka til 2 av 10 seminarum í skúlanum við Løkin. Tað verða Høgni Johannessen, Jóhan Petur Johannessen, Ove Brim, Tom Jacobsen og Mariann D. Poulsen, sum koma at hava tvey seminar hvør.

Døgurði verður at fáa aftan á seminarini fyri 100 kr.

### Latið okkum standa saman

Við hesum brævi bjóða vit samkomum, kirkjum og einstaklingum - vaksnum, ungum og tannáringum - um at standa saman um stevnuna. Latið okkum standa saman bæði í bøn, við tí praktiska, tí fíggjarliga og við at luttaka til tiltøkini m í Bylgjuni.

### Ókeypis – Fíggjarligan stuðul

Sum øll helst vita, so kostar eitt slíkt tiltak nógv, sjálvt um øll hjálp er sjálvboðin. Samlaðu útreiðslurnar fyri tiltakið eru áleið 100.000 kr. Útgreiningin av útreiðslunum stendur á næstu síðuni.

Um samkomur, kirkjur og einstaklingar bera byrðuna saman, verður hon léttari at bera. Stuðul til MiniTeenStreet 2020 kann flytast sum gáva á kontu: 9181- 1667744 viðmerk: TS20FO. Vit ynskja longu nú at takka fyri stuðulin.

Vit takka fyri forbøn og stuðul, og ynskja at bjóða øllum hjartaliga vælkomnum í Bylgjuna 21 – 23. februar 2020.

TeenStreet
www.teenstreet.fo

**Vinarliga TeenStreet Føroyar**

Andrias Magnussen, Margareth Djurhuus,
Randi Hansen og Símun J. Hansen

OM FØROYAR
www.om.fo

## Útgreining av útreiðslunum av MiniTeenStreet

Hetta er fjórða árið, at vit skipa fyri MiniTennStreet í Føroyum. Øll arbeiðskraftin er sjálvboðin, men útreiðslurnar til útgerð, hølisleigu, keyp av mati til kvøldini, ferðaseðlar o.a er útgreinað her:

| **MiniTeenStreet 2020 - Útreiðsluyvirlit** | |
|---|---|
| **Ferðaseðlar Josh og Debs Walker - USA-FO retur** | Kr. 21.500 |
| **Gisting í FO – Hotel Runavík** | Kr. 1.500 |
| **Leiga av Bylgjuni** | Kr. 9.000 |
| **Leiga av Ljóð- og ljósútgerð** | Kr. 40.000 |
| **Leiga av Videoútgerð** | Kr. 15.000 |
| **Matur/eingangs - drekka, backstage o.a.** | Kr. 13.000 |
| **Óvæntaðar útreiðslur** | kr. 10.000 |
| **Tilsamsans – Uml.** | **Kr. 110.000** |